

Havnar leksikon:

# Hotel Thorshavn í Sigmundargøtu

Frá 1925 til 1946 hevði Andrea Nicodemussen (1875-1968) hotell í Sigmundargøtu í Havn. Hotellið kallaðist »Hotel Thorshavn«. Andrea var ættað av Sandi og flutti sum ung til Havnar.

Síðan 1969 hevur Sunneva Gram havt klædnahandil í hesum húsunum. Í dag eitur handilin »Fljóðið«.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í samband við »Hotel Thorshavn«, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon á telefon: 314647 / 273168.

*Myndaeigarar:*

*Høvuðsmyndin: Føroya Fornminnissavn*

*Innsetta myndin av Andreu Nicodemussen: Sunneva Gram*

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Pól Skarðenni málningaframsýning á Norðoya Kunningarstovu

**Tíðindaskriv**

Listamaðurin Pól Skarðenni letur upp málningaframsýning á Norðoya Kunningarstovu leygardagin 26. februar kl. 14.00

Á skránni eru oljumálningar frá føroyskum umhvørvi og náttúru.

Pól, ið er føddur í Klaksvík í 1962, byrjaði av álvara at mála í 1979. Hann hevur búð fleiri ár uttanlanda, men í 1992 flutti hann aftur til Føroyar og býr nú á Vatnsoyrum saman við familju síni.

Hansara framsýningar kring landið hava verið væl vitjaðar, og serliga í Klaksvík hevur áhugin verið sera stórur, kanska tí at hann hevur sínar røtur í Norðoyggjum.

Framsýningin letur upp leygardagin 26. februar kl. 14.00 og er opin til kl. 18.00

Annars verður opið soðleiðis:

Mánadag - fríggjadag: frá kl. 10.00 - 12.00 og kl. 13.00 - 16.00

Framsýningin heldur fram til 31. mars.

